# John er mentanarliga kúheiðin

**- Eg havi hvørki kallað løgtingslimir fyri neyt, ella John Johannessen eina kúgv, men mentanarliga er hann kúheiðin, sigur Kári á Rógvu, tingmaður um varaformann Løgtingsins**

POLITIKKUR
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

- John Johannessen er mentanarliga kúheiðin.

Tað er skoðsmálið, sum varaformaður Løgtingsins fær frá Kára á Rógvi, løgtingsmanni, eftir ein orðadrátt í Løgtinginum fríggjadagin.

Sum tað sæst í aðrari grein, varð Kári á Rógvi átalaður fyri at hava kallað tinglimir atkvøðuneyt og beint aftaná varð hann eisini hóttur við at verða varpaður á dyr fyri at hava samanborið John Johannessen við eina kúgv í stiga.

- Áheitan mín var á tingfólk um ikki at sova, men heldur vakna, um at koma úr fongslinum og ikki vera atkvøðuneyt hjá fíggjarnevndini, sigur Kári á Rógvi í eini viðmerking.

- Púra óvart átalaði varaformaðurin John Johannesen bæði røðuna í síni heild, tí hetta var ikki aðalorðaskifti og serliga at neyt ikki hava atgongd til tingsalin, sigur Kári á Rógvi, sum kallar John Johannessen bæði áfalnan og óvirðiligan.

- Loksins spurdi eg fynduga og spydiga varaformannin, um rættleiðing hansara skuldi skiljast soleiðis, at ikki bar til at siga, at John Johannessen sum formaður klárar seg sum kúgv í stiga, sigur Kári á Rógvi.

- Tá gjørdist politiski leiðarin í javnaðarflokkinum firtin og tók orðið frá mær, sjálvt um eg ikki hevði biðið um at sleppa siga meira.

Kári á Rógvi heldur, at henda átala kann samanberast við mangar av óátalaðu málblómunum hjá monnum sum Óla Breckmann ella Henrik Old, ella frá § 266b-kjakinum, tá samkynd veruliga vórðu ósømiliga niðurgjørd.

- Soleiðis havi eg hvørki kallað tingfólk "neyt" – ella varaformannin "kúgv" men brúkt tað, tey nevna orðamyndir – metaforar.

- Orðið "atkvøðneyt" er sera vanlig hugtak í politiskum orðaskifti, ið ikki minst ellisformaður løgtingsins plagar at brúka, sigur Kári á Rógvi.



Gleðilig jól og gott postár.

post.fo

*Vit ynskja øllum okkara viðskiftafólki eini gleðilig jól og eitt gott nýggjár.*

FAROE
LAW

TRÓNDRAGØTA 19 · 100 TÓRSHAVN




**BMW 316 TI COMPACT**

BMW 316 ti Compact 1,8 frá desember 2001 til sølu.Sera væl hildin. Sýnaður í oktober 2007. Svartur, 2 hurðar, nýggj dekk.

**tlf 213199**

## Vinnugranskari

***Hevur tú áhuga fyri gransking og nýskapan!*** Sært tú vinnuligar møguleikar í fiski og biotøkni! Og kundi tú hugsað tær at brúkt tínar førleikar at nomið doktaraheitið! So er eitt spennandi og avbjóðandi starv at søkja hjá Atlantic Biotechnology (ABt).

**ABt hevur í samstarvi við Fiskivinnuroyndir sett av játtan í 3 ár til "Vinnugranskara".**

Tann, sum settur verður í starvið, kemur m.a. at arbeiða við at:

1) optimera hydrolysuprosessir til framleiðslu av úrdráttum úr fiskarávøru,
2) finna eginleikar hjá úrvaldum bioaktivum peptidum í fiski, umframt
3) lýsa og skjalfesta vinnuligu møguleikarnar í útvaldum prosessum og produktum.

Arbeiðið hjá vinnugranskaranum verður lagt til rættis í samráð millum umsøkjara, ABt og tann granskingarstovn, sum kemur at átaka sær vísindaligu vegleiðingina. Miðað verður eftir, at vinnugranskarin tekur vísindaligt Ph.D.-heiti.

Starvið sum vinnugranskari er samstundis partur av granskingarverkætlan, sum ABt hevur sett gongd á saman við m.a. Forskningscenter Foulum, Fróðskaparsetri Føroya og Molekylærbiologisk Institut við Aarhus Universitet. Vinnugranskarin kemur tí at virka í einum granskaraumhvørvi á høgum altjóða støði. Roknast má við, at vinnugranskarin brúkar fyrstu tíðina til at seta seg inn í tær skipanir og framleiðslur, sum ABt arbeiðir við. Framyvir væntast, at vinnugranskarin fær týðandi leiklut í okkara vørumenning.

Ert tú áhugað(ur) í hesum starvi, vænta vit, at tú hevur kandidatútbúgving innan náttúruvísindaliga økið (eitt nú biokemikari, matvøruverkfrøðingur, kemiverkfrøðingur, ella líknandi). Ert tú um at verða liðug/ur at lesa, ert tú eisini vælkomin at søkja.

Tað er ein fyrimunur, um tú hevur royndir innan framleiðslu, som sum matvøruframleiðslu, hydrolysu ella membrantøkni.

Ein umsókn, har tú lýsir tínar royndir, umframt tínar tankar við einum tílíkum starvi (fullfíggjað ph.d-ætlan er tó ikki neyðug), skal vera okkum í hendi í seinasta lagi tann 20. januar 2009. Umsóknin skal sendast til Atlantic Biotechnology, Uppsalagøta 39, 700 Klaksvík og merkjast "Vinnugranskari".

Hevur tú áhuga fyri starvinum, ert tú vælkomin at seta teg í samband við Gest Hovgaard, stjóra, tlf. +298213856 ella Sigurð í Jákupsstovu, nevndarformann, tlf. +3548916141.

UM ATLANTIC BIOTECHNOLOGY: ABt varð stovnað í 2005 við tí endamáli at menna og framleiða biotøkniligar úrdráttir úr fiskatilfeingi. Felagið hevur ment sínar fyrstu úrdráttir og fer í 2009 undir framleiðslu í Føroyum. Tað starvast í løtuni 3 fólk í felagnum, og vit samstarva við virki og granskingarstovnar í Norðurlondum, USA, Stóra Bretlandi og Hollandi.